BILROKT.fo BRÚKTIR BILAR TIL SØLU



TOYOTA COROLLA 2.0 Diesel
Árg. 1996
Km. 175.000
Nýsýnaður, hevur krók
nú 50.000,-

FORD FOCUS 2,0/135 HK TREND
Árg. 1999
Km. 92.000
nú 75.000,-





TOYOTA CARINA E 2.0 GLi
Árg. 1998
Km. 100.000
nú 69.000,-

SAAB 9-3 2,0
Árg. 1998
Km. 85.000
Sera væl útgjørdur og super væl viðfarin
nú 115.000,-





FORD FOCUS 1,6
Árg. 2005
Km. 11.000
Bilurin er sum nýggjur
nú 175.000,-

TOYOTA COROLLA Aut 1,6i
Árg. 1992
Km. 118.000
Aut. gear, powerstýring
nú 22.000,-





OPEL VECTRA 2,5 DIESEL
Árg. 1997
Km. 180.000
nú 44.000,-

MITSUBISHI PAJERO SPORT TDi VAN
Árg. des 2005
Km. 6.500
Klimaanlegg, leðursetur, cd, el-rútar og -spegl, krók, hita í setrunum, tónaðar rútar, gáttir, vel, sportsfelgur. Bilurin er sum nýggjur. Nýprísur 290.000
nú 229.000,-





VW TRANSPORTER 2,5 TDi
Árg. 1997
Km. 170.000
nú 95.000,-

FORD FOCUS 1,6i
Árg. 2005
Km. 11.000
Aut. gear, powerstýring
nú 165.000,-



BILRØKT
v/Jákup á Borg · Varðagøta 77 · FO-110 Tórshavn
tel: 58 88 80 · bilrokt@bilrokt.fo

# Alduorkan verður veruleiki




**Í ES síggja tey somikið stórar møguleikar í alduorku, at føroyskt/skotska SeWave hevur fingið fyribils tilsøgn um stuðul á 10,2 mió kr. til ger av alduorkuverki. Verkið verður væntandi liðugt í 2009**

ALDUORKA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Gjøgnum størsta partin av mannaættini hevur ein av stóru spurningunum verið, hvørt tað ber til at temja veldugu náttúrukreftirnar, sum støðugt gera um seg kring allan heim.

Enn hevur eingin tó megnað hetta kynstrið, men í nógvum førum eru loysnir funnar, har velduga orkan, sum náttúran inniheldur, kann gagnnýttast.

Í trý ár hevur SEV verið partur av verkætlan, sum júst hevur til endamáls at troyta teir møguleikar, sum mangan harðbalna føroyska náttúran gevur okkum.

Saman við skotska Wavegem stovnaði SEV á sinni SeWave, sum hevur til endamáls at kanna møguleikarnar fyri eini verkætlan um alduorku í Føroyum. Skotska felagið hevur í fleiri ár arbeitt við verkætlanum um alduorku. Og saman við servitanina, sum SEV hevur innan tunnilsgerð, mettu partarnir, at møguleikarnir fyri samstarvi áttu at verið góðir.

## 10 ES-milliónir

Og tað eru ikki bara í Føroyum og í Skotlandi, at fólk trúgva upp á verkætlanina. Í desember mánaði søkti SeWave ES um stuðul til verkætlan við aldurorkuverki, og nú um dagarnar kom svarið úr Brüssel.

Her verður sagt, at ES metir verkætlanina sum sera áhugaverda, og at fyribils tilsøgn er givin um stuðulin. Í næstum fara umboð fyri SeWave soleiðis á fund við ES, soleiðis at treytirnar fyri tilsøgnini kunnu greinast.

Verður tilsøgnin endaliga latin, verður hetta samstundis startskotið til ítøkiliggeran av alduorkuverki við Nípuna í Vágoynni. Gongst eftir vild, verður farið undir projekteringsarbeiðið innan fáar mánaðir, og ætlandi skal nýggja verkið standa klárt í 2009. Talan verður um alduorkuverk við tilhoyrandi granskingarstøð, og verður samlaði kostnaðurin einar 35-40 mió kr. Metta framleiðslan verður 1 mió KwH um árið, svarandi til nýtsluna hjá 1.250 húsarhaldum.

### FAKTA

Nýtu aldurnar sum stempul

Talan er um púra nýggja tøkni, sum SeWave ger nýtslu av í alduorkuverkinum. Ella kanska skuldu vit sagt gomul tøkni í nýggjum hami.

Tað serliga í føroysku ætlanini er, at talan er um eina skipan, sum ger nýtslu av alduorku uttan at framleiðslan av teirri orsøk er á opnum havi.

SEV hevur gjøgnum árini gjørt nógvar royndir við boran av tunlum, og við at bora tunlar inn í bergið, skal eitt rúm við skiftandi lufttrýstið skapast. Hetta tí áhaldandi rørslurnat í sjónum skapa ávíkavist undir- og yvirtrýst.

Móðirfelag hjá skotska Wavegem er týska Voigt-Siemens, sum er ein av heimsins størstu turbinu-framleiðarum. Teirra uppgáva er at seta turbinur upp í boraðu tunlunum, og koma hesar turbinur at framleiða orkuna.

# Eitt veldugt framstig

**Bæði stjóri og nevndarformaður í SeWave royna at halda beinini á jørðini, men samstundis er staðfestingin, at fyribils ES-tilsøgnin er eitt risa-fet frameftir hjá føroysku ætlanunum um alduorku**

ALDUORKA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Enn hava vit ikki fingið pengarnar á bók. Talan er um eitt tilboð frá ES um at koma í samráðingar við teir. Og tað eru nógvar treytir, sum skulu lúkast, áðrenn vit hava fingið nakrar stuðulskrónur at arbeiða við.

Soleiðis sigur Poul Arni Jacobsen, nevndarformaður í SeWave, nú tað er greitt, at føroysk/skotska verkætlanin av álvara hevur vakt áhuga í ES.

## Í heims-elituni

Men hóast varisligu orðini, so skerst ikki burtur, at talan er um ein sera fegnan nevndarformann.

– Vit síggja hetta sjálvandi sum ein stóra blástempling av okkara verkætlan. Áhugin fyri alternativari orkuframleiðslu er alsamt vaksandi, nú oljan støðugt dýrkar. Tí eru tað nógvar verkætlanir og umsóknir, sum koma á borðið hjá ES. Og at okkara so er vald út millum hesar, vísir í øllum førum, at vit eru á rættari leið.

*Vilt tú siga, at Føroyar við hesum hava flutt seg fram í heimsoddin, tá tosað verður um alduorku?*

– Okkara fatanj er í øllum førum, at vit eru á rættari leið. Og at vit liggja frammaliga í feltinum. Eisini hóast arbeitt hevur verið við alduorku í eini 20-25 ár. Hóast talan ikki er um nýggja tøkni, so er okkara verkætlan serstøk, tí vit hava framleiðsluna á landi, og tað sparir hópin av trupulleikum. Og kanska er tað júst hetta, sum hevur gjørt ætlanina somikið áhugaverda fyri ES, staðfestir Poul Arni Jacobsen.

## Vilja ígongd

Og stjórin í felagnum, Ólavur Gregersen, er so langt ífrá ósamdur í hesum.

– Fyrst og fremst, so ger hendan blástemplingin, at tað verður munandi lættari hjá okkum at finna nýggjar samstarvsfelagar og eisini fíggingarmøguleikar. Tá ein slík tilsøgn verður givin í ES, so hendir tað ikki, fyrr enn fleiri serfrøðingar hava hugt at málinum, og tað vita fólk innan vinnuna.

– Tí er hetta eitt veldugt framstig hjá okkum, og vónin er nú, at vit longu komandi hálva árið kunnu fara í holt við projekteringina, sigur Ólavur Gregersen.